DAGSINS MEINING

Trygd og tunlar

Trygdin í undirsjóvartunlinum hevur verið samtaluevnið í eina tíð. Tess nærri vit koma 10. desember, tá koyrandi verður í Vágatunlinum, tess meira viðkomandi gerst spurningurin um trygdina. Talan er ikki bara um at siggja trygdina isolerað til sjálvan tunnilin. Tað snýr seg eisini um ta øktu ferðslu á samlaða veganetinum, ið tunnilin letur upp fyri. Vit hava verið heppin, at so fáir skaðar hava verið í verandi tunlum. Men vit mugu ikki gloyma, at teir hava viðkað um koyrimøguleikarnar, og tað hevur havt við sær nógvar vanlukkur. Sjálvandi vil einhvør íloga í menning eisini hava negativar avleiðingar við sær. Spurningurin eigur tó at verða settur: um vit - tá vit bygdu tunlarnar og harvið skaptu eina nýggja ferðslumentan - í nóg stóran mun eisini tóku hond um trygdina á vegunum! Og tað er nettupp hesin spurningurin, ið aftur gerst aktuellur, nú undirsjóvartunlar fara at seta á dagsskránna eina uppaftur nýggjari ferðslumentan - uppá gott og ilt.

Undirsjóvartunnilin verður orsakað av longdini ein øðrvísi avbjóðing enn verandi tunlar. Tí má trygdin raðfestast 100%. Í øllum lutum. Beinanvegin. Vit minnast, hvussu "Bussurin Langi" kolaðist upp millum tveir tunlar. Vit eiga at spyrja, um slíkt kann henda í undirsjóvartunlinum, og hvussu stóran skaða kann tað elva til! Hevur man tryggjað sær í trygdarkonseptinum,at t.d. bussar og lastbilar, ið koyra skulu gjøgnum tunnilin, hava verið til eftirlit við jøvnum millumbili, soleiðis at vit ikki hava tikkandi bumbur koyrandi har! Støðugt eftirlit við tungu og stóru akførunum er alfa og omega. Spurningurin er: hava vit lært av og tikið til eftirtektar tað, sum hendi við floghavnsbussinum? Vit hoyra um venjing og bjarging eftir eina vanlukku. Tað er av alstórum týdningi. Men eiga vit ikki at hava fyribyrgingina fremst í huganum! Hava vit tað?

Ein annar partur av trygdini er broytta ferðslumentanin, tá tunnil bráddliga bindur oyggjar saman. Hava vit hugsað um, at nógv fleiri ung fólk fara at koyra í bili - úr Fuglafirði, av Toftum, av Eiði, úr Havn osfr. - til Gásadals! At forvitnast. At "dríva" tíðina. At stuttleika sær. Tunnilin fer at hava við sær, at økt ferðsla verður ikki bara í tunlinum men á øllum vegakervinum. Krevur tað ikki, at løgreglan er betri mannað og oftari úti á náttartíð! Størri krøv til sjúkrahús og kommunulækna! Spildurnýggj krøv til alt samfelagið. Einki samfelag kann liva við, at fleiri av tess ungu koma til skaða og doyggja í ferðsluni! Einki samfelag kann eiheldur bara standa og hyggja at, meðan ein stórur partur av ungdóminum fer at brúka størri part av lívinum á vegunum! Vit mugu taka vandamálini í størsta álvara - nú vit øll men serstakliga tey ungu hava møguleika fyri at koyra meira og longri, nú tunnilin bindur oyggjar saman. Fyri ikki at tosa um Norðoyartunnilin. Tað krevur størri ansing, eftirlit, skelting og upplýsing. Tað krevur, at fleiri pengar verða til at brynja okkum til hesa nýggju tíðina. Stór ábyrgd liggur á okkara politikarum fyri tað fyrsta at staðfesta henda veruleika og harnæst - tá teir hava givið grønt ljós fyri hesi kollosalu broytingum í samferðslukervinum - at tryggja, at okkara ungu fólk ikki gerast offur í einum útviklingi, sum tey ikki sjálv eru før fyri at yvirskoða.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

PROCESSIN

Heri Mohr

Í seinastu viku var undirritaði ein av fleiri, sum við lesarabrøvum gjørdu vart við ræðandi kenslum, sum tóku seg upp, tá Dagur og Vika hevði samrøðu við ein ungan pápa at tveimum sjúkum smábørnum, sum, orsakað av landskassans gjaldføristrupulleikum, ikki kunnu fáa neyðuga serviðgerð á Ríkishospitalinum fyrr enn einaferð næsta ár, og tað hóast **serviðgerð á Ríkishospitalinum v.m. er kostnaðarleys fyri føroysku sjúkrahúsini,** tí peningurin ætlaður til serviðgerð á nevnda sjúkrahúsi er í heildarveitingini, í blokkinum, sum landskassin fær úr ríkiskassanum. Hetta er sagt og skrivað fleiri ferðir, og enn hevur ongin afturvíst pástandin um, at sjúkraviðgerðir av føroyskum sjúklingum - patientum -, sum yvirlæknar á føroyskum sjúkrahúsum avgreiða til Ríkishospitalið v.m., eru ókeypis, og um rætt er atborið, eigur tað ikki at koma fyri, at avgerðir hjá yvirlæknum at geva sjúklingum serviðgerð á Ríkishospitalinum v.m., verða kolldømdar av einum landsstýrismanni. Og tá ið tað sum sagt er talan um útreiðslur, ið ríkiskassin sambært lóg eigur at rindar, er tað heilt burturvið, at lógin ikki verður umsitin við tí tryggleika og sjálvfylgju, sum sjúk og næstingar vanta og hava krav uppá.

Frá l. januar 1988 fór tað, sum serviðgerð á Ríkishospitalinum kostar, 100% í blokkin, og har hevur tað verið til denna dag. Og í fylgiskjølunum til avtaluna um blokkskipan millum ta donsku regeringina og landsstýrið er greitt tilskilað, at "endelig fastlæggelse (av játtanini til R-sjúkratalet". Men sum so nógv annað er eisini tað sópað av borðinum: landsstýrið hevur nú um dagarnar fráboðað, at eingin regulering av tí, sum eftir er av blokkinum, skal fara fram í 4 ár.

Hesin tragikomiski sjónleikurin minnir okkum eldri og gomlu um rosinpillarin, sum hinumegin diskin (skivuna) servilt letur kundan vita, at kardúsið er uppi, og at tað verður tíverri ikki at fáa aftur fyrr enn í næsta mánað.

Tað er eingin uggi hjá foreldrunum at teimum báðu smábørnunum at vita, at tey ikki eru einsamøll í líðingini. Fólk, ið hava serviðgerð fyri neyðini, hava á opnari gøtu greitt frá, at tey hava fingið somu yvirlæknaboð: - tað er uppi, kom aftur næsta ár.

Er hesin niðurskurður í sjúkraviðgerð á Ríkishospitalinum, sum vit sambært lóg hava møguleika at fáa - og tað ókeypis - ein liður í processini, sum løgmaður og aðrir landsstýrismenn við jøvnum millumbili plaga at minna okkum á? Ein process, sum fer at gera tað meira liviligt í Føroyum eisini hjá sjúkum, avlamnum og gomlum?

Í heimskendu skaldsøguni Processin skrivar Franz Kafka um bureaukratiið, sum so við og við brýtur niður sjálvsvirðing og mótstøðumegi.

Hvussu nógvir sjúklingar og næstingar teirra mugu liva í slíkari ræðslu, er ikki gott at vita, men vit mugu sanna, at bert er bróðurleyst bak, og frændi er frændi verst.

Eingin ivi um, at nógv fólk takka Hilmar Jan Hansen fyri tað, sum hann skrivaði í bløðunum í seinastu viku.

Hetta neyðarrópið í tí tjúkku slavtokuni, sum í nøkur ár hevur ligið sogin á okkum, fer at hoyrast í føroyskum heimum, áðrenn tað fánar og líðandi tagnar. Hvin og grenj halda uppat.

Andans pávar, kulturmenskur, allir rættir føroyingar (í koti), krevja ljóð og ró at virka í frið og náðum, tí teir verða serkønir í heimaráðum hjá sjúkum og gomlum, høgum og lágum ……..

Processin fullførd; - serføroysk bureaukratmentan leingi livi.

Rætting til rætting

Jóhann Mortensen
tíðindaleiðari,
Útvarp Føroya

Erhard Jacobsen finst í Sosialinum týsdagin at tíðindunum í Útvarpi Føroya sunnudagin 10. nov. um, at teir mongu dieselbilarnir hava økt munandi um koltvíiltuútlátið, CO2-útlátið, sum kemur frá bilum.

Erhard Jacobsen metir seg hava prógv fyri, at dielselbilar í royndog veru dálka minni enn bensinbilarnir.

Útvarpið vil hinvegin greitt vísa aftur, at stovnurin ber óálítandi sensatiónstíðindi, soleiðis sum greinskrivarin vil vera við.

Tíðindini endurgeva trúliga umhvørvisfrágreiðingina, sum Oljumálaráðið hevur latið gera. Kanningin sigur, at koltvíútlátið frá akføroum er økt 54 prosent í tíðarskeiðnum frá 1998 til 2001, og at stóra økingin stavar frá dieselolju. Í kanningini verður víst á, at talið á dieselbilum í Føroyum er økt nógv tey seinastu árini.

Sostatt er talan um væl undirbygd tíðindi, har víst varð til kelduna.

Upplýsingarnar hjá Erhardi Jacobsen kunnu vera áhugaverdar og viðkomandi, men tað gevur ikki greinskrivaranum rætt til at skjóta boðberan niður, tá hann endurgevur eina nýggja føroyska umhvørviskanning.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nú er nóg mikið

Marita Hentze
form.

Brot úr samgonguskjalinum: NÝGGJUR TEKNISKUR SKÚLI OG STUDENTASKÚLI VERÐA BYGDIR Í TÓRSHAVN. Undirskrivað av fólkaflokkinum, tjóveldisflokkinum, sjálvsstýrisflokkinum og miðflokkinum.

Í bløðunum, beint eftir at samgongan var skipað, verður m.a. sagt. Sitat: Eitt kollveltandi nýtt, sum er komið burturúr samgongusamráðingunum er, at tað skal bera landinum til at gera íløgur uttan at tyngja um Landskassan….. Her verður serliga hugsað um bygging av almennum stovnum, eitt nú skúlum,…..Íløgurnar skulu so rindast aftur um raksturin, yvir eitt ávist áramál.

Lærararáðið á Tekniska Skúlanum í Tórshavn hevur fingið innlit í skriv, stílað til Tekniska Skúlan, og sum er frá landstýrismannin í verkætlanin kann skipast.

Av tí at Føroya Handilsskúli og Tekniski Skúlin Tórshavn eru sjálvsognarstovnar, hava skúlarnir lógarheimild til sjálvir at standa fyri bygging og figging av skúlunum. Sigast skal, at verkætlanin ikki er ein forðing fyri, at eisini Studentaskúlin í Hoydølum kann fara undir bygging. Tvørtur ímóti kann henda byggingin samansjóðast, soleiðis at málsetningurin í samgonguskjalinum verður náddur.

Í stuttum kann sigast, at verkætlanin vísir á, at bygging av nýggjum hølum til tekniska skúlan og viðkan av handilsskúlanum, kunnu loysast, og hvussu figgingin av meirjáttan til rakstur uppá uml. 4,2 mió kr. um árið.

Í svarinum frá landsstýrismanninum verður sagt, at ongar formligar forðingar eru fyri at figgingin kann skipast eftir hesum leistinum.

Sostatt skuldi ein trúð, at allar forðingar eru av vegnum, tá ið hetta jú fylgir málsetningin í SAMGONGUSKJALINUM um bygging av skúlum.

Tann parturin í samgonguskjalinum sum viðgerð játtan til Tekniska Skúlan í Klaksvík at fyrireika útbygging er longu samtyktur, og gleðir hetta okkum, tá ið tað sjálvsagt vísir á, at samgongan hevur í hyggju at fylgja sínum samtyktum.

Í skrivinum frá Mentamálastýrinum eru fleiri vónbrot. Tað fyrsta er, at Figgjarmálaráðið góðtekur ikki nakra binding í samband við hækkan av stuðli til rentuútreiðslur næstu 2o - 25 árini. Er figgjarmálaráðið ikki partur av samgonguni??

Næsta vónbrotið er, at raðfestingin sigur at tekniski skúlin kann vænta (um alt gongur væl) at fáa sín skúla um eini TÍGGJU ár. Hvussu leingi situr henda samgongan?

Triðja vónbrotið er, at tekniski skúlin eigur at verða nøgdur, tí landsstýrismaðurin hevur játtað skúlanum pening til eitt makaskiftið, soleiðis at skúlin nú eigur fýra barakkir, ístaðin fyri at leiga fýra barakkir.

Barakkirnar vóru settar upp 1980, sum ein fyribilsloysn til skúlan fyri 5 ár.

Fjórða vónbrotið er niðurstøðan hjá landsstýrismanninum. Sitat: studentaskúlin verður bygdur fyrst, og tí mátti tekniski skúlin fáast í tryggar kamar…..Byrja var síðani at viðlíkahalda hallirnar. Tøkini verða øll útskift í ár…

- skapar hetta tryggar kamar?

Lærararáð tekniska skúlans góðtekur ikki slíka viðferð.

Um hetta er endaliga niðurstøðan hjá hesari samgonguni, er alt trúvirðið fokið, og kann Tekniski Skúlin í Tórshavn óiva veittra farvæl til nøktandi hølir, og harvið til møguleikar fyri, at menna tær handverksligu og tøkniligu útbúgvingarnar í Føroyum.

Alt tað um, at nú verður tykkara tørn um eini 8 - 10 - 15 ár er uttanumtos, sum vit hava hoyrt síðani skúlin var settur á stovn í 1934.

Vit velja at trúgva, at samgongan ikki tekur undir við tí viðferð, sum Mentamálaráðið gevur Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Livst so spyrst.

Vegna lærararáðið á Tekniska Skúlanum í Tórshavn

Snýtir nakar í skatti?

Eyðun Mohr Viderø

Herfyri skrivaði eg eina grein um skattalistan, sum liggur frammi til alment eftirlit í øllum kommununum, og eg mælti øllum skattaborgarunum til at hyggja eftir listanum og eftir umstøðunum kanna, um allir teirra meðborgarar høvdu eina skattskylduga inntøku, ið so vítt okkum kunnugt svaraði til inntøku teirra annars.

Eftir mínum staðkunnleika nevndi eg bygdina Sandur, men hetta er sjálvandi galdandi fyri helst allar bygdir í Føroyum.

Sjálvsagt hevur hetta fingið eina ávísa røring í bygdarsamfelag okkara, at onkur tekur til orðanna í so persónligum viðurskiftur og kanska ákærir partar av borgarum okkara fyri at "snýta í skatti"!

Eg ivaðist ikki í, at onkur fór at gera vart við seg, men ikki ímóti mær persónliga, tí bæði vóru persónar greiðir yvir, at undirritaði í sínum langa politiska lívi, og tá serliga kommunalt, hevði neyvt innlit í lokalpolitiskum og persónligum skattaviðurskiftum, og harumframt, í hvussu er inntil nú, skuldi eg brúka allar "stemmurnar" hjá hesum somu fyri at koma afturíaftur til eitt komandi løgtingsella kommunuval, og síðan eri eg í ávísan mun umboð fyri ein politiskan flokk, og í hesum sambandi kann eg ikki loyva mær at "genera" møguligar floksfelagar!!

Tað er nokk so áhugavert at fylgja við, hvør í slíkum førum ger vart við seg. Tveir samdir persónar hava vent sær til mín og lagt dent á, at tað er gott, at onkur við kunnleika ger vart við stoðuna, men hesir eru ikki samdir um, hvat skal náast við einari sovorðnari uppgerð.

Annar er ein vanligur lønmóttakari, ið skal av við hvørt oyra lutfalsliga av inntøkuni í skatti, soleiðis sum lóggávan sigur, men viðkomandi er eigari av nakað av jørð, og í samráð við innkeypara av størri nøgdum av handilstøðum og djórafóðri keypir hesin ikki frá vanligum handli fyri vanligan pris, men hjá øðrum innkeypara fyri at sleppa bíligari, men viðkomandi er tíverri ikki greiður yvir, at tá manglandi inntøkuna hjá landskassanum, má viðkomandi sjálvur gjalda yvir landsskatt og mvg-avgjald. So spurningurin er, um hesin er greiður yvir, hvat hann er samdur um?

Hin samdi er reindyrkaður tjóðveldismaður, ið er samdur, men er yvaleysur í, at talan er um onkran annan enn tjóðveldismann, ið skal "jarðast", men sannleikin er, at her er eingin munur á monnum. "Slík kann byttan vera sum lokið!"

Ein javnaðarmaður var so einfaldur, at hann spurdi meg: "Hvør tað er, ið tú er so illur við!"

So einfald er tankagongdin, at viðgerð av týðandi samfelagsligum trupulleikum snýr seg bert um "ein" persón, ið skal jarðleggjast!

Tá ein persónur "snýtir" í skatti, so skal ein annar gjalda fyri hann, men eingin av okkum vil verða snýttur!

Eg vil ikki verða snýttur, og eg ynski heldur ikki, at meðborgarar mínir skulu verða snýttir, og tí ynski eg at gera vart við kanska bert part av "skattasnýtingini", tí talan er væl eisini um, hvussu gongst við afturberingini av mvg-gjaldinum, ið vit fáa rokning fyri fyri ymiskar tænastur, men sum ivi kann vera um, um hesar seinni verða avroknaðar til toll- og skattstovu?na! Hesum havi eg sjálvsagt einki prógv fyri, men eg kenni roknингarnar!

Mong gremja seg dagliga um stoðuna, bæði millum manna og í fjølmiðlunum, um "figgjar?stoðuna", men eru tey vitandi um, at tá tú fær tær bíligari handilstøð, bíligari seyðaføður, og bíligari olju til upphitan av setshúsum, so ert tú samstundis við til at geva tær sjálvum eina hægri skatta- og avgjaldsrokning, tí ongin "hini" eru at gjalda uttan tú sjálvur!